# Hví flýggja menniskju?

*4.-6. flokkur*

**Tíð**: 30 minuttir

**Tilfar/Amboð**: Uppgáva 3, post-its og talva

**Námsætlan**: Næmingurin eigur at fata ta ábyrgd, menniskjað hevur av sær sjálvum og medmenniskjum sínum. (Kr) Søga er bæði ein hugvísindalig og ein samfelagsfaklig lærugrein. (Sø) Lærugreinin føroyskt tekur støði í næminginum í síni heild, varðar um vitbornu evnini, eins og tey kensluligu og sosialu. (FØ)

**Frágreiðing**: Nógvar orsøkir kunnu vera, at menniskju fara frá sínum heimstaði, tí eru eisini ymisk sløg av flóttafólki. Í hesum upplegginum verða hesi viðurskifti viðgjørd:

- Hví menniskju flýggja
    - Fátækradømi og arbeiðsloysi
    - Hungur og hungursneyð
    - Veðurlagsbroytingar
    - Kríggj og ófriður

- Onnur viðurskifti
    - Gestaarbeiðari
    - Politiskt friðskjól
    - FN kvotuflóttafólk

**Soleiðis gert tú**: Set næmingarnar í smáar bólkar og gev hvørjum bólki sær ein bunka av post-its. (Tað ber eisini til at brúka padlet.com, um næmingarnir hava teldil ella teldu) Skriva so á talvuna: Hví flyta fólk til onnur lond? Og spyr: ”Hvat skuldi til, at tú flutti úr tínum heimstaði?”

Næmingarnir tosa sínamillum um spurningin, og skriva so ymsu orsakirnar, at tey høvdu flutt frá sínum heimstaði, á leparnar.

Tekna eina loddrætta striku mitt á talvuna og skriva: Eg vil rýma – NÚ! (push) høgrumegin og skriva vinstrumegin strikuna: Hatta vil eg! (pull)

Bið næmingarnar seta leparnar undir ta yvirskriftina, sum best hóskar til tekstin tey hava skrivað. Gev teimum so Uppgávu 3, og bið tey kanna eftir, um tey hava fingið alt við á leparnar. Um tey hava okkurt at leggja afturat uppgávu 3, kunnu tey skriva tað á reglurnar niðast á síðuni.

Takið samanum og spyr næmingarnar, um tey kenna okkurt av hesum aftur frá Degi og viku ella frá tíðindum í útvarpinum.